# Bech fekk fótin



Eftir enn eitt tap í superliguni í gjár, gav Esbjerg venjaranum Troels Bech sekkin. Tað hevur gingið sera illa hjá Esbjerg seinastu tíðina, og liðið er í botninum í superliguni. Sessurin hevur brent undir Troel Bech í eina tíð, og nú var tolið hjá leiðsluni uppi. Fram til ársskiftið verður tað hjálparvenjarin Jess Thorup, sum hevur ábyrgdina av liðnum. Troels Bech er upp á til starv í norskum felag.

# AB tapti

AB var um vikuskiftið á útivølli í Vestur-Sælandi og spældi ímóti Næstved. Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir máttu fara aftur til Gladsaxe við ongum stigi, og ongum máli. Dysturin endaði 1-0 til heimaliðið. Tíverri varð AB-verjan ikki árvakin við dystarbyrjan. Longu í 5. minutti fall sigursmálið hjá Næstved, sum Anders Nielsen skoraði. Vøllurin var rættiliga vátur og tungur, og tá vóru ælini ikki so fá meðan dysturin var í gongd. Hjá AB kom tað illa við at tapa. AB liggur sum nr. 5 við 24 stigum. 5 stig eru upp til 2. plássið, sum gevur uppflyting til SAS-liguna. AB hevur ein dyst eftir hesumegin nýggjár, og er talan um ein heimadyst ímóti Skive, sum liggur á einum 10. plássi við 17 stigum.

## Virðingin ov stór

Una Olsen hjá Stjørnuni staðfestir, at tær ikki undirmettu VB í gjár – hinvegin var virðingin ov stór.

- Aukse Vysniaskaite var aftur á VB-liðnum, og vit hugsa ov nógv um hana. Vit hugsa ov nógv um teirra spæl, og tað er ikki fyrr enn eftir hvíldina, at vit spæla undir fríari teymum. Men vit eru heldur ikki klárar, og tá fær tað næstan ikki verið øðrvísi, staðfestir Una Olsen.

Kann tapið fáa keðiliga ávirkan á tykkum til komandi dystir?

- Vit mugu ikki gloyma, at hondbóltur bara er eitt spæl. Vit mugu duga at tapa og læra av tí. Sjálvandi hava vit góðar vónir til dystin móti Neistanum í komandi viku, sigur Una Olsen.

-uni

## Vit fara allan vegin

- Vit vinna í ár. Tað trúgva vit sanniliga uppá.

Laila Jespersen hjá VB var sjálvsagt fegin um sigurin í Klaksvík í gjár. Hon staðfestir, at talan var um ein sokallaðan off-day, tá Stjørnan fyrr í ár vann við átta málum í Vági. Vágskvinnur eru líka sterkar sum føroyameistararnir.

- Vit vóru als ikki klárar til tann dystin. Nú hava vit eisini fingið styrk í Aukse Vysniaskaite. Tað er munurin nú frá seinast. Vit standa einki aftanfyri Stjørnuna.

Hví missa tit takið á dystinum í seinna hálvleiki?

- Tær byrja at mansverja, og tað órógvar nógv. Vit taka skeivar avgerðir og spælið verður heldur tilvildarligt. Men vit fingu bæði stigini, og tað hevur størstan týdning, staðfestir Laila Jespersen, sum skeyt trý av málunum hjá VB.

-uni

Stjørnan – VB 24-25 (8-16):

# VB er til reiðar

**VB vann oddabrakið í Klaksvík, sum lyfti tær upp á liðina á føroyameistarunum á stigatalvuni. Vágskvinnur eru til reiðar at stríðast um gullkrónurnar**



*VB tók størsta takið higartil, tá tær á útivølli koppaðu Stjørnuni*

*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

VB varð í seinastu viku skýrt sum einasti avbjóðarin hjá Stjørnuni um FM-heitið. Og tað varð dyggiliga staðfest í høllini í Klaksvík í gjár.

Í holuni hjá Stjørnuni, har klaksvíkskvinnur hava verið einaráðandi seinastu árini, eydnaðist tað vágskvinnum at fáa fulla úrtøku í toppdystinum. Harvið lyftu tær seg upp á liðuna á føroyameistarunum, og startskotið til stríðið um gullkrónurnar hevur av álvara ljóðað. Og VB er til reiðar at bjóða av.

### Løgdu bragdliga fyri

Heilt tíðliga sóust greiðar ábendingar um, hvar sigurin skuldi fara. VB var klárt omaná, og einu løtuna tóku klaksvíkingar á síðulinjuni til, at tað var eyðmýkjandi fyri heimaliðið. Kanska høvdu teir rætt, tí tá farið varð til hálvleiks vóru gestirnir á odda við átta málum. Uppleggið hjá vágskvinnum var fyrst og fremst at verja fyri stórskjúttanum Simonu Petersen. Hóast hon fekk 10 mál, so hevði hon tað torført undan hvíldini, tá trý av málunum vórðu skotin.

Stjørnan hevði sera torført við at fáa ferð á bóltin í fyrra umfarinum. Alt ov ofta endaðu álopini við ússaligum skotum ella skeivum avleveringum, sum gav VB møguleikan at fara í skjótálop. Verjuspælið hjá heimaliðnum var eisini alt annað enn sannførandi, og fleiri ferðir sluppu gestirnir leikandi lætt ígjøgnum. Og tað líkist nú heldur ikki Stjørnuni at lata 16 mál ígjøgnum eftir einum hálvleiki.

### Um reppið

Henrik Gerster, venjari hjá Stjørnuni, var alt annað enn fegin, tá dómararnir brísklaðu til hálvleiks. Litríki og snarsinti danin ræðist ikki at tosa við stórum bókstavum, og tað hevur verið alt annað enn rós, sum hann hevur borið sínum leikarar um í steðginum. Tí Stjørnan var sum kollvend í seinna hálvleiki.

Spakuliga og trygt minkaðu tær um tryggu leiðsluna hjá VB. Í verjupartinum riggaði trýstspælið væl, og gestirnir fingu langt frá sama pláss. Í hinum endanum tóku klaksvíkskvinnur av, har Asta Armonaviciute í heilum noyddist í málið eftir bóltinum.

Tríggir minuttir restaðu, tá Rannvá Johannesen við sínum einasta máli í dystinum økti til 25-21. Tá skuldi verið avgjørt, men Stjørnan skoraði tríggjar ferðir afturat, soleiðis, at bara eina málið skilti liðini, tá avtornaði.

### Aukse við aftur

Vágbingar hava leingi bíða eftir leikaraloyvinum hjá Aukse Vysniaskaite, sum fyri árum síðan spældi við VB. Tað kom upp á pláss um vikuskiftið, og í gjár var hon aftur í stríputa bláa og reyða búnanum. Hon royndist væl á miðjuni, hóast klaksvíkskvinnur tóku sær væl av henni. Aukse Vysniaskaite fekk fýra mál.

### VB bjóðar av

Við sigrinum liggja Stjørnan og VB ájavnt í stigum á fyrsta plássinum. Trý stig eru til nærmastu kappingarneytarnir, og hóast kappingin bara er seks umfør gomul, so er líkt til, at klaksvíks – og vágskvinnur fara at stríðast um FM-heitið. VB hevur vunnið á øllum liðunum longu, meðan Stjørnan fyri fyrstu ferð tapti í gjár.

Spurningurin er nú einamest, hvussu Stjørnan fer at handfara fyrsta heimatapið í longri tíð. Útivøllur móti Neistanum er ikki lættasta uppgávan.

### FAKTA um dystin

**Stjørnan – VB 24-25 (8-16)**
**10 min:** 2-6
**20 min:** 5-10
**40 min:** 12-19
**50 min:** 17-21
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Simona Petersen 10 (1), Durita Christophersen 6, Dianne Møller 3, Una Olsen 1, Durita Ljósstein 1, Durita Mikkelsen 1
**VB:** Daiva Tuiomaite 8, Gurið Mortensen 7, Aukse Vysniaskaite 4 (2), Laila Jespersen 3, Bára Mortensen 2, Rannvá Johannesen 1
**Brotskøt:** Stjørnan 1, VB 3
**Útvísingar:** Stjørnan 3, VB 4
**Dómarar:** Hanus Kúrberg og Hans Thomassen


